


www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 06 - 2012

# Fleiri føroyskir veitarar til Statoilboring

Nú tíðin nærkast til at sett verður á aftur føroysku undirgrundina ber til at staðfesta, at fleiri føroyskir veitarar eru til boriverkætlanina. Statoil hevur eins og til tær undanfarnu boringarnar í 2001 og 2006 lagt seg eftir at brúka føroyskar fyritøkur sum veitarar í tann mun hetta er gjørligt. Hetta hevur við sær, at Atlantic Airways, Thor, Atlantic Supply Base, Effo og Magn fáa úr at gera komandi mánaðirnar at veita tænastur til Brugdan 2 brunnin. Fríggjadagin savnaði Statoil, sum er fyristøðufelag fyri hesi djúpastu og dýrastu boringini á landgrunninum nakrantíð, teir føroysku veitararnar saman við útlendskum veitarum so sum borifelagnum Cosl og oljuvinnufeløgum sum Halliburton og Transocean, at gjøgnumganga arbeiðsætlanina við fólki frá Statoil. Eisini vóru umboð frá Jarðfeingi tilsteðar. Hetta er tað, ið verður rópt Pre Spud fundur á oljumáli. Myndir - Føroyskir veitarar til boringina hjá Statoil savnaðir fríggjadagin, fáar dagar, áðrenn sett verður á undirgrundina. Her umboð fyri Atlantic Airways, Atlantic Supplybase, Thor, Effo og Magn. Frá Pre spud fundinum há Statoil í Havn fríggjadagin. Her eru umboð fyri Statoil, Jarðfeingi og føroyskar og útlendskar veitarar. Myndatøka - oljan.fo/Jan Müller